# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein víðskygdan og virðiligan bisp

Nógv hevur verið tosað um val í seinastuni. Val kann vera so nógv. Vit gera okkara val hvønn dag, men so eru tað valini við nógvum árum ímillum. Og val fyri lívið. Eitt av hesum er valið av tí fyrsta nývalda bispinum í yvirtiknu føroysku fólkakirkjuni.

Hóast tað ikki er alment, hvør stillar upp, so kenna vit kortini nøvnini á teimum, ið stilla upp til hetta týðandi embæti. Hesi skulu longu í "eldin" leygardagin, tá skipað verður fyri fundi millum kirkjuráðslimir og bispakandidatarnar. Tað eru nevniliga ikki vit øll, sum skulu velja bisp, men einans kirkjuráðslimir og prestarnir, eini fimm hundrað fólk í tali.

Tað er uttan iva sera ymiskt, hvønn týdning vit leggja í eitt bispaval. Tað eru tey, sum halda, at tað er næstan líkamikið, hvør er bispur, meðan onnur leggja stóran dent á júst, hvør hesin verður. Onkur vil hava ein bisp, ið kann virka sum fakfelagsmaður/kona fyri prestarnar, ein, ið tryggjar og varir av prestastættini. Onnur halda, at umráðandi er at hava ein bisp, ið er okkara andsliga trúarandlit bæði inneftir og úteftir, tann, sum raðfestir, hvørji virði vit sum fólk og tjóð eiga at leggja okkum eftir.

Í okkara hugaheimi skal hann røkja báðar uppgávurnar. At hann fer at røkja áhugamálini og tørvin hjá síni egnu stætt átti at verið ein sjálvfylgja. Meðan hin parturin, sum vit leggja alstóran dent á, hvussu víðskygdur og virðiligur hann er, hvussu stórt tolsemi er, hvussu vítt til veggja og høgt til loftið verður, er av alstórum týdningi.

Tað er greitt, at Føroya fólk hava ymsar áskoðanir um, hvønn leiklut bispur skal hava og hvørji virði hann skal raðfesta og standa fyri. Lat okkum fáa ein bisp, sum stendur fyri víðskygni og tolsemi og sum ikki er bangin fyri at fylgja mongu av norðurlendsku starvsfeløgum sínum. Fyri mong kann bispur hava ein landsfaðirligan leiklut, sum vegleiðir og ráðgevur og sum setir út í kortið. Vit hava ikki tørv á einum bispi við trongskygni og "gamla testamentarligum" útleggingum av Bíbliuni. Bispur eigur at vera hevjaður upp um hetta bara at egintulka og bókstaviliggera Bíbliunnar orð. Hann eigur at taka tað besta og tað, sum flestu av okkum kenna okkum hoyra til. Heldur enn eygað fyri eygað útlegging er tað vón okkara, at hann fer at raðfesta orðini hjá Jesus Pápa um at venda hin hjálkan til, um at gera fíggindar til vinir, um at fara inn í kamar sítt ol.

Føroya komandi bispur eigur at hava VÍÐSKYGNI fremst í skjøldri sínum. Hetta orð merkir sambært orðabókini: væl upplýstur, víðan sjónarring, frælslyntur, tollyntur og rúmskygdur. Miðlahúsið fer í viku 38 at hava alment Bispating á Trapputinginum.

Sosialurin

## Høvuðpína við eitt bispaval

**JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD**
rithøvundur



Vit fáa nýggjan bisp um stutta tíð. Kandidatarnir vórðu avmyndaðir í Dimmu her fyri. Eg, sum føddur limur í fólkakirkjuni, fái onga ávirkan á, hvønn eg vil hava at leiða fólkakirkjuna næstu árini. Eg valdi ikki sjálvur at gerast limur í fólkakirkjuni. Eg varð føddur inn í hana, doyptur av vælmeinandi kærleiksfullum foreldrum, og tók sjávur støðu til konfirmatiónina.

Nú skulu prestar og limir í kirkjuráðum velja fremsta starv í fólkakirkjuni og løgmaður at enda seta í starv, og eg, sum limur í fólkakirkjuni havi onga ávirkan. Ein ikki serliga demokratisk mannagongd.

Dimmalætting og myndirnar av valevnunum liggja framman fyri mær. Tær hava eisini staðið í Sosialinum, tvey arbeiðspláss, eg havi havt tættan tilknýtning til gjøgnum lívið Tað er nátt, eg eri vaknaður aftur og siti hálvnakin og súpi havragrýn. Hvønn av hesum vildi eg havt í starv, um eg hevði ávirkan. Fleiri verða kveistraðir til viks í stundini og at enda eru tveir eftir, síðan ein, ein og tveir, tað skiftir eitt sindur..

Og nú koma kritisku tankarnir. Eg fylli 50 ár komandi mánadag og eg eri ein av teimum, sum í fyrsta lagi kann uppliva at halda silvurbrúdleyp í 2021 um lív og heilsa og semja verður lagað okkum Poulu og mær. Eg hevði kunna verið giftur í hvussu er tvær ferðir áðrenn, um tað var meira "in" at giftast, tá ið eg var ungur ella um tað var eitt krav fyri at kunna liva saman.

Vildi eg havt ein bisp sum hevði noktað mær og konuni hjúnalagið seinstu 11 árini, bara tí vit høvdu havt eitt lív saman við øðrum frammanundan? Svarið er rungandi nei.

Í mínum gerandisdegi eru fólk, sum eru samkynd. Tað sást á summum av teimum longu sum børn, at hetta fór at vera teirra lutur í lívinum. Hetta er menniskju eins og eg við dygdum og lastum og við somu evnum at elska sum eg sjálvur. Og kærleiki, uttan mun til hvussu hann kemur til sjóndar, kemur ikki frá monnum, men frá Gudi. Kærleiki kemur bert til sjóndar, um vit steðga okkara tankum og lata Gud sleppa framat.

Vildi eg havt ein bisp, sum gjørdi lívið enn tvørligari hjá samkyndum enn tað framman undan er? Svarið er eitt rungandi nei.

Síðan eg byrjaði sum útbúgvin journalistur í 1982, og allarhelst eisini frammanundan, hevur landslæknin gjørt eina ársfrágreiðing. Í hesi hevur á hvørjum ári staðið hagtøl yvir fosturtøkur í landinum. Minsti parturin av hesum fosturtøkum eru framdar, tí vandi er fyri lívi mammunar í orðsins rætta týdningi. Føroyska samfelagið hevur góðkent fosturtøku, tað vísa hagtølini og hóast tað, so eiga vit onga lóg um fria fosturtøku. Við míni vitan um samfelagið veit eg, at fosturtøkur verða ikki bara framdar av lættlivandi damum. Fosturtøkur koma fyri í øllum familju, eisini teimum bestu. Tær koma fyri í fólkakirkjuni, í brøðrasamkomuni, í heimamissiónini og í teimum smærru sektunum. Tað skuldi ikki undra meg, at onkur sum hevur tilknýti til Lindina ikki eisini hevur framt fosturtøku.

Vildi eg havt ein bisp, sum legði eyka byrðu og revsing omaná hesar ólukkuligu kvinnur, sum ikki síggja annan útveg enn fosturtøku, tá ið ástarinnar heiti leikur vendist til pínu og sálarkvøl? Svarið er eitt rungandi nei.

Fólkakirkjan er ein gomul kirkja, og eg havi hug at halda at hon stinkar av gomlum vana. Kirkjan er ikki opin, orðið er ikki frítt. Tú skal verða teologur fyri at trína fram í kirkjuni og bera guðs orð fram. Fimm ár á hægri skúla í útlondum eru neyðug fyri at bera guds orð fram í fólkakirkjunni.

Hvussu ber tað til? Leitaði Jesus í templinum millum skriftklókar og farisearar eftir lærusveinum. Nei, hann fór til útróðrarbygdirnar við Generaretsjógvin. Hann fann óskúlaðar garnamenn, sum skuldu bera orðið víðari. Hann fór inn á Toll og Skatt eftir Matteus. Hann fór allarhelst í ein banka eftir Judasi, kanska tí týdningarmiklasta lærusveininum, tí hann gjørdi alt okkara trúargrundarlag við krossfestingini og uppreistri møguligt.

Eg havi verið deknur í fleiri ár. Bæði úti í heimi, og eisini sum eyka, eyka, eyka, eykadeknur í míni heimbygd Òyndarfjørður. Eg sleppi ikki at bera guds orð fram, soleiðis sum tað bylgist í mínum hjarta, soleiðis sum Gud talar til mín. Eg verið noyddur at lesa onkran turrgeldan lestur, sum ein útbúgvin prestur einaferð í fyrndini hevur skrivað. Livandi orðið, sum tekur støðu í samfelagnum í dag sleppur ikki av mínum varrum, eg skal lesa Guds orð soleiðis sum Jákup Dahl próstur sá tað, langt fyri eg var føddur og eg fylli 50 mánadagin. Her er talan um protektionismu, her verjir prestastættin sítt starv í besta fakforeiningsstíli.

Guðs orð í fólkakirkjuni er endað í snobbið, har bara ein við eini kandidateksamiu frá hægri lærustovni kann endurgeva og útleggja útróðrarmenninar við Genesaretvatnið. Eg dugi at leggja út Guðs orð, soleiðis sum andin talar til mín. Men eg sleppi ikki av einari stirvnari prestastætt, sum heldur upp á sín rætt og verjir seg. Her er bara talan um at verja egin borgarlig rættindi, hetta hevur einki at gera við Guðs orð. Og tí eiga vit so nógvar sektir í dag. Læsta fólkakirkjan tódnar og guds orð livir kring landið millum vanlig fólk, sum ikki finna seg í at verða leidd av øðrum enn Gudi.

Og hví skal bispur verða prestur? Halgabók sigur, at Jesus valdi útróðrarmannin Pætur sum grundleggjara av kirkjuni. Hann var okkara fyrsti pávi við kirkjusøgan vera við og hann var ikki útbúgvin teologur.

Vil eg havi ein bisp, sum verjir einans sínar prestar og sum ikki er við til at lata kirkjuna upp fyri tungu vanliga manna? Svarið er eitt rungandi nei.

Hvønn bisp vil eg so hava? Eg vil hava ein bisp, teolog ella ikki, sum kann lata kirkjuna upp, soleiðis at hon livur upp til breiða heitið ein fólkakirkja. Ein bisp, sum tilletir vanligu meinigheitini at koma til orðanna undir vanligari guðstænastu.

Eg vil hava ein bisp, sum er bispur teirra elendigu, teirra útstoyttu. Hann skal vera bispur teirra í øvunda, teimum íð horast, teimum sum snýta og bedraga, teimum samkyndu, teimum sum eru gift fleiri ferðir og ætla at giftast aftur. Hann skal verða bispur teirra sum fremja fosturtøku og eisini bispur teirra um fordøma tey sum fremja hesa..

Eg vil hava eina bisp, sum ikki kastar fyrsta steinin.

Hellurnar tann 6. september

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.